# Nú hevur Árni sett á í Lopra



*– Arbeiðið hevur gingið gott higartil, sigur Árni Brattaberg, sum fekk fyrst-a føroyska sáttmálan í sambandi við eina møguliga oljuvinnu.*

ÁKI BERTHOLDSEN

Nú er arbeiðið byrjað at økið við borholið í Lopra klárt at bora á.

Teltaxið, vit øll hava bíðað eftir í næstan tveir mánaðir kom mikudagin um, at nú var alt pappírsarbeiði av greitt og at klárt var at seta á.

Tíðin er knøpp so tað var einki at bíða við og longu hósmorgunin vóru varð maskinan sett ígongd.

## Gingið gott

Tað hevur gingið gott og higartil, higartil hevur tíðaræætlanin hildið, sigur Árni Brattaberg, sum ger arbeiðið.

Árni Brattaberg hevur seks vikur um at fáa moldina omanav og at planera og asfaltera teir gott 3.000 fermetrarnar, umframt at leggja kloakk til arbeiðsskurðarnar, sum skulu setast upp.

So vit noyðast at koyra á og vit arbeiða til út á kvøldið, sigur hann.

Eisini allan leygardagin arbeiddu teir.

Leygarkvøldið vóru teir liðnir at grava moldina omanav og í gjáramorgunin fóru teir undir at planera við grót. Um 14 dagar skuldi stykkið verið planerað.

Higartil hevur bara ein maskina verið til arbeiðis, men í morgun fóru teir at leggja kloakk og so varð brúk fyri meiri fólki.

Seinni koma norðmenn til Føroya at bora tvey serlig hol í sambandi við boringina.

Tey eru til at goyma borar í.

Árni Brattaberg sigur, at so hvørt sum borað verður niður í Lopra, skulu borar skiftast út. Teir borarnir, sum ikki verða brúktir, verða goymdir í holum í jørðini. Hesi hol eru so serlig, at norðmenn mugu koma higar at bora tey.

*Nú er niðurtegingin byrjað. Maskinan hevur sett á í Lopra og um seks vikur er stykkið klárt at seta boran á.*




Alt frá innast til uttast




Skálabúðin
Dr. Jakobsensgøta 21, tlf. 15315


# Umhvørvisarbeiðið í føroyskum kommunum verður styrkt

16 føroyskar kommunur eru farnar undir at gera umhvørvisætlanir. Hetta er liður í eini verkætlan, sum er stuðlað av Føroya Landsstýri og Norðurlandaráðnum.

Tá ein umhvørvisætlan verður gjørd, verða umhvørvisviðurskiftini í kommununi fyrst kortløgd. Umhvørvisviðurskiftini verða vurderað og raðfest, og við hesum sum grundarlagi leggur kommunan síni mál og ger eina ætlan fyri tey komandi árini.

Tá kortleggingin av umhvørvisstøðuni verður gjørd, fæst eitt grundarlag, so lættari verður at síggja, hvørji umhvørvismál skulu loysast fyrst. Tann avmarkaða fíggjarorkan, ið kommunurnar hava til umhvørvismál, verður samstundis nýtt á fullbesta hátt.

Arbeiðið við at gera umhvørvisætlanir í kommununum byrjaði fyrst í mai mánað. Fyrst verður mett um umhvørvisstøðuna á ymiskum økjum, t.d. drekkivatnsgóðskuna, kloakkviðurskiftini, óruddi á gøtum, bø og í haga, dálking av áum og strandarøki, folkalívsminnum (so sum varðagøtum og bøgarðar), rottuplagum og trupulleikum við tøðum.

Tey økini, sum tær flestu kommunurnar hava mett neyðugt at gera nakað við, eru drekkivatnsgóðska, kloakktrupulleikar, tøðingartrupulleikar og rottur.

Fleiri av kommununum hava sett sær fyri at verða liðnar við at seta mál og gera eina ætlan fyri umhvørvispolitikkin tey komandi árini, áðrenn fíggjarætlanirnar fyri 1997 koma fyri.

Meðan kommunurnar gera umhvørvisætlanir eru tær á felags evnisfundum, har m.a. arbeitt verður í bólkum, og royndirnar hjá kommununum koma hvørjum øðrum til góðar.

Hesar kommunur eru við sum royndarkommunur í verkætlanini:

Gøtu, Haldórsvíkar, Hósvíkar, Hvalvíkar, Kirkjubøar sóknar, Klaksvíkar, Leirvíkar, Mikladals sóknar, Nes, Runavíkar, Sandavágs, Sjóvar, Skála, Sunda, Tórshavnar, Vága og Vestmanna.

Royndirnar, sum kommunurnar fáa við at gera eina umhvørvisætlan, verða savnaðar í eini vegleiðing um umhvørvisætlanir og hvussu tær kunnu gerast í einum smásamfelagi. Vegleiðingin skal eisini kunna brúkast í smá- og oyggjasamfeløgum í Norðurlondum.

Egilsstaðir kommuna í Íslandi er eisini við sum royndarkommuna.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Duritu Brattaberg á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, tlf. 15300, fax 10508.


BALLEX®
fótbóltar, hondbóltar, flogbóltar og kurvabóltar



REAL
málmanshandskar

Annars alla ítróttarútgerð til allar ítróttargreinir...

All-Inter
heilsølan